## Rík skulu rinda meiri skatt

Í einari nýggjari meiningakanning í Danmark siga 61 prosent av teimum spurdu, at tað er í lagi at krevja meiri skatt frá teimum, sum forvinna meiri enn eina millión krónur um árið. 26 prosent siga seg vera ímóti tankanum, og tey seinastu 13 prosentini hava onga beinleiðis hugsan um málið. Tað eru Sosialdemokratarnir og Sosialtisiski Fólkaflokkurin, sum hava skotið upp, at fólk, sum forvinna meiri enn eina millión krónur árliga, skulu rinda fimm prosent í eykaskatti av tí inntøkuni, sum er oman fyri milliónina. Eitt tílíkt uppskot hevði rakt umleið 20.000 danir.



## Svensk ungfólk arbeiðsleys

Um mánaðarskiftið var arbeiðsloysið í Svøríki 5,0 prosent ímóti 4,7 prosentum í mai. Talið er tó ikki sambæriligt við onnur lond, tí svenska arbeiðsloysistalið umfatar bara fólk, sum hava skrásett seg sum arbeiðsleys. Hagstovan í Stockholm sigur, at verður arbeiðsloysið roknað eftir tí háttinum, sum er vanligur í hinum ES-londunum, so er svenska arbeiðsloysið 9,0 prosent. Tað merkir, at 446.000 sviar eru heilt ella lutvíst arbeiðsleysir, skrivar tíðindastovan TT. Tað er serliga hugvekjandi, at arbeiðsloysið millum svensk ungfólk er sera stórt. Hagstovan sigur, at av teimum 15 til 24 ára gomlu eru 30 prosent arbeiðsleys. Tað er helvtina meiri enn fyri einum ári síðani.



*Ein 26 ára gomul kvinna varð avvíst av læknavaktini, hóast illgruni var um at hon hevði H1N1 smittuna*

*(mynd: Beinta Haraldsen)*

# Avvíst hóast illgruna um smittu

**Ein 26 ára gomul føroysk kvinna fekk onga hjálp og varð avvíst av læknavaktini, hóast hon segði at hon var úr sama flogfari sum maðurin, ið hevur fingið staðfest H1N1 smittuna. Tað veit Kringvarpið at siga í dag**

H1N1

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Kringvarp Føroya veit í dag at siga, at ein ung kvinna varð avvíst av læknavaktini um vikuskiftið, hóast grundaðan illgruna um svínakrím.

Eftir fleiri áhaldandi og miseydnaðar royndir, fekk kvinnan um hálvgum trý tíðina sunnudagin fatur á læknavaktini. Har greiddi hon frá, at hon kendi seg illa og hevði fepur. Harafturat hevði hon verið í sama flogfari sum maðurin, sum longu hevur fingið staðfest krímið. Men har fekk kvinnan at vita, at støðan ikki var nóg álvarsom, og at vakthavandi einki fekk gjørt. Tí varð hon avvíst.

Síðani hevur hon verið hjá kommunulækna, og har hevur hon fingið at vita, at hon helst er smittað við H1N1 smittuni, hóast hetta enn ikki er endaliga váttað.

Kvinnan er kannað, men tað ganga í minsta lagi tveir til tríggir dagar til endaligt svar fæst.

### Sat undir liðini á smittaða

Tey avvarðandi og 26 ára gamla kvinnan standa púra spyrjandi, og undrast stórliga framferðarháttin hjá læknavaktini.

Kringvarpið veit nevniliga at siga, at kvinnan hevur sitið undir liðini á manninum, sum hevur fingið staðfest H1N1 smittuna, tá hon kom við flogfarinum til Føroya týsdagin í farnu viku klokkan 14.

- Tí tykist tað okkum púra óskiljandi, at læknavaktin hevur skúgvað allan illgruna til viks og hevur avvíst kvinnuna, siga avvarðandi hjá kvinnuni við útvarpið.

Tey undrast eisini á tað dupulta í at myndugleikarnir boða frá, at tey, sum hava verið við flogfarinum, eiga at koma undir læknahond beinanvegin, um tekin eru um sjúkueyðkenni, samstundis sum læknavaktin avvísir kvinnuna, tá hon boðar frá.

## Eitur ikki svínakrím

Heimsheilsustovnurin hjá ST, WHO, samtykti tann 30. Apríl í ár, at nýggja krímið ikki skal kallast svínakrím, men at stovnurin framyvir bert fór at nýta vísindaliga heitið, ið er H1N1 influensa A. Orsøkin er at WHO óttast at ræða brúkarar frá at eta svínakjøt, og at man vil sleppa undan at lond geva boð um hópslátur av svínum. Boðini komu dagin eftir at Egyptaland gav boð um, at tað vildi slakta øll tey 400.000 svínini í landinum, ið verða hildin av einum kristnum minniluta, koptunum. Fleiri lond hava eisini bannað innflutning av eitt nú svínakjøti úr Meksiko, hóast svínakrím sambært WHO ikki breiðir seg við at eta svínakjøt, ið er reiðiliga gjørt til.

*-rn*

# Verj teg og onnur móti Nýkríminum (H1N1)

*Lagt til rættis: Rógvi Nybo*

Danska Heilsustýrið ávarar á heimasíðu sínari um, at hóast Nýkrímið er eitt sera milt krím, so er avgjørt orsøk til at royna at avmarka smittuna

- Nýkrímið (H1N1) er ein nýggj virus, ið upp á stutta tíð er breidd til tað mesta av heiminum. Í allarflestu førum gevur nýggja krímið mild sjúkueyðkenni, ið eru av eftir bert fáum døgum. Hóast tað, er umráðandi at avmarka smittuna, ávarar Sundhedsstyrelsen á heimasíðuni.

Til tess at fáa fólk at avmarka smittuna, hevur danska Heilsustýrið listað upp trý góð ráð, um hvussu tú eigur at gera.



### Hosta ella nýs í ermuna

Krím breiðir seg gjøgnum virus í smáum dropum frá hosta, njósturi ella líknandi. Káva tí út yvir munn og nøs, tá tú hostar ella nýsur. Nýt ein einnýtis lummaklút ella ermuna, heldur enn hondina.



### Vaska hendur javnan

Krímvirus setur seg lættliga á hendurnar og breiðir seg umvegis lógvatak og yvirflatur so sum hondtøk. Vaska tí javnan hendurnar við sápu



### Ver heima, um tú ert sjúkur

Krím breiðir seg lættliga á skúlum, arbeiðsplássum og í stovnum. Set teg í samband við lækna umvegis telefon, heldur enn at møta upp í bíðirúminum.

*Kelda: www.sundhedsstyrelsen.dk*